**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
Telefon 118 20 – Telefax 147 20

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 118 20 – Telefax 147 20

## veðrið

Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi rekur í landnyrðing norður um Føroyar móti Norðurnoregi. Kølin luft rekur móti Føroyum, av vestri at byrja við, seinni av útnyrðingi. Móti endanum av vikuskiftinum nærkast eitt lágtrýst við regni Føroyum vestaneftir. Tað verður eitt vet lyggjari aftur.

Hósdagin



Hvassur vindur upp í skrið, 15–20 m/s, av vestri, nakað ádrigið, ælingur, men annars toluligt ella gott sýni. Hitin millum 2 og 5 stig. Móti náttini minkandi vindur av suðri og útsynningi, væl av regni eitt skifti, annars toluligt sýni.

Fríggjadagin
Hvassur vindur upp í skrið, 15–20 m/s, av vestri at byrja við, seinni av útnyrðingi, ádrigið, ælingur, sum fráhður vatasiettings- ella kavaælingur, men annars toluligt sýni. Hitin millum 2 og 5 stig.

Leygardagin
Hvassur vindur upp í skrið, 15–20 m/s, av útnyrðingi, lutvíst ádrigið, vatasiettings- ella kavaælingur, men annars gott sýni. Hitin millum 1 og 4 stig.

Sunnudagin og mánadagin
Sum fráhður millum sunnan og landsynning, eingir m/s, ádrigið, regn vestaneftir og bert toluligt sýni. Hitin millum 5 og 8 stig.

## óli teknar

© 1993 Sosialurin / Óli Petersen

*Allahandamaðurin*



*– Er Richard inni?*

**Fiskiskip, fiskiloyvir, fiskikvotur og fígging – alt klárar Kjartan Hoydal**

# Seismisku feløgini koma í næstu viku

Ein av teimum mest átroðkandi spurningunum á oljuráðstevnuni herfyri var at fyrireika samráðingar við seismisk feløg. Skal tað bera til at byrja seismisku kanningarnar longu í næsta ár, soleiðis sum bæði landsstýrið og oljuráðleggingarnevndin ynskja, so er neyðugt at arbeiða miðvíst og skjótt.

Í hesum sambandi hevur oljuráðleggingarnevndin havt fleiri fundir og hevur boðsent fleiri seismiskum fyritøkum á fund í Føroyum í næstu viku. Tað ber ikki til at fáa nøvnini á fyritøkunum men Sosialurin hevur skilt, at talan er um fleiri av teimum kendastu fyritøkunum og eru hesar úr fleiri londum.

jan







*Framhald av síðu 2*

við blaðið, at teir vóru júst komnir úr Spania og skuldu gera kanningar. Hann vildi ikki siga hvar og av hvørjum.

Fólk, sum blaðið hevur tosað við, siga, at møguliga er talan um eitt skip, sum antin ger oceanografiskar kanningar ella tað hevur lurtiútgerð at leita eftir kavbátum við. Um talan er um eitt seismiskt skip duga keldur okkara ikki at svara.

Vit hava fingið at vita, at skipið, tá ring verður er, plagar at fara í Havn í Glasgow. Tað er amerikanska stjórnin, sum eigur skipið, men tað verður so leigað út til uppgávur fyri militerið og eisini privatar fyritøkur.

Av tí at tað ikki hevur borið til at fáa nakrar nágreiniligar upplýsingar um skipið og hvat tað ger á okkara leiðum stendur spurningurin um talan er um eitt skip ið ger seismiskar kanningar ella ikki, opin. Vónandi fáa vit hann svaraðan í næsta blað.

jan

## Vestfalskyrrindi

**24. november: Mánin longst frá jørðini**
**29. november: Fullmáni**
**6. desember: Seinna kvarter**
**10. desember: Mánin næstur jørðini**

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. des. | 0839 | 2101 | 1039 | 2301 | 0654 | 1916 | 0854 | 2116 | 0739 | 2001 | 0754 | 2016 |
| 3. des. | 0924 | 2147 | 1124 | 2347 | 0739 | 2002 | 0939 | 2202 | 0824 | 2047 | 0839 | 2102 |